# vinnur



*Um nakar so hevur Magni Laksáfoss vent upp og niður upp á ákoðanina um, hvussu føroyskur fíggjarpolitikkur kann rekast*

*Savnsmynd*

meðan raksturin er hækkaður við umleið 200 miljónum, eru íløgurnar minkaðar við umleið 100 miljónum.

Einasta øki í landinum, har veljarin heldur vil síggja sparingar í rakstri enn í íløgum er Sandoyggin, har einans 4 út av 10 ynskja at spara í íløgum heldur enn í rakstri. Men her eru tølini so smá, at tey tíverri ikki eru so álítandi.*

Sí talvu

### Fólkafloksveljarar heitastir fyri at spara rakstur

Tað eru tey, ið siga seg vilja velja Fólkaflokkin, ið ynskja heldur at spara í almenna rakstrinum enn í íløgum í vegir og tunnlar. Men heldur ikki her er tað sannførandi. Fólkafloksveljarar standa umleið á jøvnum.

Miðflokkaveljarar eru eisini rímiliga samdir við Fólkafloksveljarar. Her ynskja 45 % heldur at spara í almennum rakstri. Fyri hinar flokkarnar eru tað umleið 3 til 4 út av 10 veljarum, ið ynskja heldur at spara í almennum rakstri enn í íløgum í vegir og tunlar.

Sí talvu

Tað bendir á, at Magni Laksáfoss hevur rakt rætt við sínum politikki. Hetta varð fyrst staðfest á fólkatingsvalinum, og nú bendir á, at veljarin sum heild tekur undir við hansara hugsjón. Tað má sigast at vera ein góð vitan at fara á val við.

Sambandsflokkurin hevur jú roynt at standa sum tannábyrgdarfulli flokkurin, ið ikki kundi standa vitni til at ein javnaðarmaður og ein fólkafloksmaður høvdu eina hálva miljard reikandi uttanfyri fíggjarlógina. Bæði Sambandsflokkurin sum heild og Magni Laksáfoss sum persónur hava dugað at sett seg í eina martýrstøðu í mun til hinar báðar flokkarnar.

Um Magni Laksáfoss og Sambandsflokkurin megna at halda fast um "Læruna hjá Laksáfoss" heilt fram til valið, so kunnu hinir samgonguflokkarnir verða noyddir til at laga seg til hesa læruna. Og tá kann gerast talan um eina samgongu við einum fullkomiliga øðrvísi búskaparhugsjón enn tann undanfarna.

### Laksáfoss stuðul úr Tjóðveldi

Men alt er ikki so ljósareytt sum tað tykist hjá Sambandsflokkinum og Magna Laksáfoss. So løgið tað ljóðar eru eingir veljarar so ósamdir við Magna Laksáfoss sum júst veljararnir hjá Sambandsflokkinum. Ein-

ans 48 % av teimum, ið hava tikið støðu, stuðla afturhaldandi skattapolitikkinum, meðan 52 % hinvegin vilja hava fleiri skattalættar í komandi valskeiði.

Sjálvt av fólkafloks- og sjálvstýrisveljarunum vilja umleið 6 av 10 ikki vita av skattalætta. Umleið 7 av 10 mið- og javnaðarfloksveljarunum vilja ikki hava skattalætta. Og mest móti skattalætta eru veljararnir hjá Tjóðveldi og Miðnámsflokkinum, har umleið 8 av 10 ikki ynskja skattalætta.

Sí talvu

Spurningurin er so um Magni Laksáfoss í grundini er limur í skeivum flokki. Tað eru veljararnir úr Tjóðveldi, ið eru mest samdir við honum hvat viðvíkur skattatrýst. Hinvegin fær hann eisini dyggan stuðul úr Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum hvat viðvíkur heldur at útseta íløgur í veghir og tunnlar heldur enn at spara í rakstri.

Ella er Sambandsflokkurin í veruleikanum í ferð við at velta politisku moldina til eina heilt nýggja samgongu eftir valið?

Viðvíkjandi smáu valdømunum og smáu flokkunum eru tølini í veljarakanningini so smá, at tað saktans kann raka meiri enn 10 % við síðuna av, tá hesir smábólkarnir verða býttir upp í uppaftur smærri bólkar. Strangliga tikið má innanhýsis býtið av meiningum í smáu flokkunum og smáu valdømunum ikki síggjast sum annað enn ein ábending.

# Rósa Samuelsen kortini á Sambandslistan

**Meðan Sambandsflokkurin í Vágum ikki skoytti um at hava Rósu Samuelsen á listanum, hevur landsfelagið nú gjørt av, at Rósa Samuelsen kortini skal vera millum valevnini til løgtingsvalið**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nú Sambandsflokkurin hevur havt sín síðsta uppstillingarfund í Havn sunnudagin, var Rósa Samuelsen kortini er at finna millum valevnini. Rósa varð annars ikki vald at koma á listan hjá Sambandsflokkinum í Vágum, tá uppstillingarfundur var her fyrr í vikuni. Fleiri aðrir flokkar hava annars fríggjað til borgarstjóran í Sandavági síðstu dagarnar, men hon valdi altso at fara aftur til heimaflokkin, tá hon kortini var vælkomin.

- Hetta er fínasta slag, og tað er ein góð kensla kortini at vera mett at vera skikkað at stilla upp fyri Sambandsflokkin, sigur Rósa Samuelsen við Portalin. Hon fer nú at fyrireika seg til valstríðið, har hjartamál hennara vera familjan og tey veiku.

Spurd, um ongin av hinum flokkunum, sum hava roynt at fáa hana upp á listan var nóg freistandi, sigur borgarstjórin í Sandavági, at tað sjálvandi er smikrandi, at fleiri bjóða seg upp á listan, men at hon kortini tók av, tá hon var boðin á sambandslistan.



*Rósa Samuelsen*

# Fíggjarætlanin fyri Sandavág samtykt

**Á bygdarráðsfundi tann 30. november samtykti bygdaráðið í Sandavági fíggjarætlanina fyri 2008**

Kommunan sigur í tíðindaskrivi, at fíggjarætlanin javnvigar við 34.348.865. Kommunuskatturin verður 20,8% og barnafrádrátturin 3.500 kr.

Bygdaráðið hevur sett soleiðis av til løgur í 2008:
1. Byggibúning 4.920.000
2. Kommunal mál 2.350.000
3. Teknisk mál 800.000
4. Skúla- og mentunarmál 1.800.000
5. Almanna- og heilsumál 4.000.000
B ÍLØGUR SAMANLAGT 13.870.000

Fígging:
Skattainntøkur 19.465.799
Lántøka 10.000.000
Eginfígging 846.929

Í tíðarskeiðinum 2000 – 2007 vóru gjørdar íløgur fyri uml. 27.000.000, sum allar eru framdar uttan lántøku.

Løgur í tíðarskeiðinum 2000 – 2007
1. Byggibúning 12.469.101
2. Kommunal mál 5.823.467
3. Teknisk mál 840.300
5. Almanna- og heilsumál 8.556.670
B ÍLØGUR SAMANLAGT 27.689.538